Maskinmeistaraskúlin
Undir Krákugjógv 5
FR-100 Tórshavn
Føroyar

Tlf. +298 312661 Fax. +298 318545

# Skeið í Skipaðum Viðlíkahaldi

verður á Maskinmeistaraskúlanum í viku 39

## Skeið 1: Amboð til skipað víðlíkahald

### Málsetningur:

Luttakarin fær nágreiniligt innlit í ymiskar viðlíkahaldshættir umframt stýring av viðlíka haldi. Eisini verður dentur lagdur á týdningin av góðum eftirlitshættum og nýtslu av røttu amboðunum, bæði innan hardware- og software.
Ymisk myndugleikakrøv verða umrødd.
Skeiðið er ein partur av fyrireikingini til
*European Expert in Maintenance Management.*

### Innihald:

Benchmarking, Viðlíkahaldshættir
Viðlíkahaldsstýring: Manuelt og teldubaserað
Sýn og trygd, klassing og revisión
NDE-amboð.
Í skeiðinum inngongur projektarbeiðið og verður tað gjøgnumgingið saman við skeiðleiðarunum 5 vikur seinni.

### Skeiðið er fyrsta av trimum, hini eru:

Mál og strategi í viðlíkahaldi
Total Productive Maintenance - TPM

### Fortreytir:

Útbúgving sum maskinmeistari, verkfrøðingur e.t.
Skeiðið verður hildið við skeiðleiðara frá
Fredericia Maskinmesterskole.

**Skeiðstað:** Maskinmeistaraskúlin, Undir Krákugjógv 5.
**Luttakaratal:** Í mesta lagi 10.

**Dagar:** 5 dagar, 24 - 28. sept. 2001
**Kostnaður:** kr. 9.000,-

*Tilmelding í seinasta lagi mikudagin 19. sept. 2001 á tlf. 312661 ella fax 318545 ella sum teldupostur til mms@mec.fo*

# Tvøroyrar Kvøldskúli veturin 2001/2002

**Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli bjóðar í vetur hesi skeið fram:**

**Frítíðarundirvísing:**

| **Lærugrein:** | **Tilmelding hjá** | **Tlf.** |
|---|---|---|
| **Hondarbeiði** | Judith Holm | 371168 |
| **Seyming**, applikering | Anna Mortensen | 372810 |
| **Veving** | Óluva Joensen | 371001 |
| | Kirsten Danielsen | 371934 |
| **Máling**/tekning | Palle Julsgart | 371669 |
| | | ella 371976 |
| **Matgerð** (Klænkikostur) (Byrjar í viku 40) | Tina Midjord | 371962 |
| **Fyrstahjálp** | Naja Mortensen | 371567 |
| **Tónleikur:** Hornblástur | Terji Jacobsen | 371300 |
| Kórsangur (gospel) | Jens Knudsen | 223053 |
| Guitarspæl | Hans Pauli Tórgarð | 318884 |
| | | ella 221638 |
| Samanspæl | Rógvi á Rógvi | 226242 |
| **Undirvísing í teld:** | | |
| Tekstviðgerð | Heri Thorsteinsson | 371632 |
| Heimasíðusmíð | Tim Wentzlau | 372470 |
| **Føroyskt fyri útlendingar** | Álvur Enni | 371723 |
| **Venjingar í heitum vatni.** Skeiðið er ætlað teimum, sum hava MB. Becterew og liðagikt. | Marjun Olsen | 372888 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning av myndugleikunum.
Tilmeldingargjaldið er 100 kr. + 3 kr. fyri undirvísingartíman.

**Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli · Tlf. 371582**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 758,
P/F Bakur, 497 Selatrað.

Nevnd:
Innkomin í nevndina:
Peter Eliberth Danielsen,
765 Svínoy.

Skráseting Føroya tann
13. september 2001

Kristin Balle

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til umlætting til 3 ára gamlan rørslubrekaðan drong í Eysturoy.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður mest í heiminum, 15 tímar kvøld og vikuskifti og eina náttarvakt, tilsamans 27 tímar um vikuna.

Setunartíðin er 01.10.01.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Ragnhild Dahl á tlf. 314822 ella til Hildur Vang á tlf. 448260 gerandisdagar millum 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Eysturoyar deild
att. Hildur Vang
Heiðavegur
600 Saltangará

# Næmingar á Luthersk Missionsforenings Højskole

Í samband við at LMH kemur til Føroya er ætlanin at skipa fyri einum kvøldið fyri næmingum, sum hava gingið á skúlanum.

Hetta kvøldið verður tann 25. sept. kl. 20.00 í Leguhúsinum í Nesvík.

**Tilmelding hjá:**
Jóhan Henriksen, Klaksvík tel. 45 97 95
Kaj Eli Hansen, Toftir tel 44 74 75 / 22 51 29
e-mail: keh@post.olivant.fo

Verið hjartaliga vælkomin.




Sosialurin




# Gerð av heimasíðum

**Fá tíni krøv til góðsku og styrki uppfyllt!**

Skeiðið viðger høvuðsreglurnar, ið gera seg galdandi, tá tú skal gera eina heimasíðu. Ofta verður bert dentur lagdur á íverkseting av teimum ítøkiligu heimasíðunum, og av tí verða ofta viðurskifti sum t.d. tørvur, planlegging, "professjonelt" snið, og tað at halda heimasíðuna livandi, ikki tikið í álvara ella kanska ikki viðgjørt yvirhøvur.

Gerð av heimasíðum seta krøv um professjonalismu, og á skeiðinum fært tú ítøkiliga vitan um grundreglur fyri snið á heimasíðum og uppbyggjanina av skipanum. Umframt fært tú eisini innlit í amboðið Frontpage 2000- í, og praktisk innlit í at brúka Frontpage 2000. Eisini verður givið leiðbeining hvussu eitt dynamiskt viðlíkahald av heimasíðum skal skipast.

Endamálið er, at luttakararnir sjálvir kunnu gerast ein skapandi partur í arbeiðinum við menning, sniði og viðlíkahald av heimasíðuskipanum.

**Tíð:** 22., 24., 25. og 31. okt. 2001 kl. 17.00 - 20.45
**Skeiðleiðari:** ***Allan Dresling***
**Kostnaður:** kr. 3.200,- íroknað frálæru, tilfar og mat
**Tilmelding:** **áðrenn 11. oktober 2001**

***Skeiðini verða hildin treytað av at nóg nógvir luttakarar tekna seg. Nágreiniligir upplýsingar um skeiðinnihald og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til***

**SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM**
**Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo**




# FRISØRAR

**Treytað av nóg stórari undirtøku, verður skeið hildið í samstarv við**

**Helmersens modesalon i Charlottenlund:**

**Heyst og vetrar mótaklipp**
**Vikuskiftið, 29. og 30. september 2001**

Demonstratión leygardag, Tórshavn 29. sept. kl. 15.00-19.00 kr. 1.750,-
Praktik hold 1 sunnudag, Tórshavn 30. sept. kl. 08.00-12.00 kr. 1.250,-
Praktik hold 2 sunnudag, Tórshavn 31. sept. kl. 13.00-17.00 kr. 1.250,-

**Skeiðleiðari:** ***Mette Stanley frá Salong Helmersen***

**Luttakaratal:** Leygardagur 29. sept. - óavmarkað
Sunnudagur 30. sept. - hægst 10 pr. hold

**Tilmelding:** **áðrenn 21. september 2001**

Luttakarar við sveinabrævi innan frisørfakið kunnu fáa helmingin í studningi frá Yrkisdeplinum.

Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.

Umsóknarbløð til Yrkisdepilin og Vitan fáast á Skeiðsdeplinum.

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tel 318813 mánadag - fríggjadag, kl. 8 - 12 & 13 - 16.

**SKEIÐSDEPILIN Á MARKNAGILI * SDM**
**Marknagilsvegur 77 • Postrúm 177 • 110 Tórshavn • Tel 31 88 13 • Fax 31 33 74, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo • Heimasíða http://sth.olivant.fo**

# Hús í Gundadali til leigu



Rúmlig hús við góðum útsýni til leigu beinanvegin ella seinni.

**Áhugað ringið á tlf. 319077 eftir kl. 17.00**

UNITED seafood **P/F Føroya Fiskavirking 650 Toftir**

# Søkt verður eftir vaskifólki

Saltfiskavirkið á Toftum søkir eftir vaskifólki at byrja beinanvegin.

Arbeiðið umfatar alla vasking í framleiðsluhølunum sambært almennu krøvunum um reinføri.

Møguligar umsóknir skulu sendast til:

**FFV-Toftir**
650 Toftir

Tað ber eisini til at ringja á tlf. 447423

# Dansiskeið



Kom og Dansa skipar 18.-23. september fyri dansiskeiðum saman við instruktørum frá **Komið og Dansið í Íslandi.**

Skeiðini eru Grundskeið í Rock'n roll og sving.
Skeiðini verða soleiðis:
**Rockesving**
Týsdag 18- Mikudag 19/9 kl 20.00-22.30
**Dansesving**
Hósdag 20-Fríggjadag 21/9 kl 20.00-22.30
**Blues Boogie**
Leygardag 22., sunnudag 23/9 kl. 13.30-16.00.

Einstakligar eins og pør eru vælkomin.
Skeiðini verða í IOGT Húsinum Tinghúsvegur 18.
Tekning í Kunningarstovuni tlf 315788
Kostnaður fyri hvørt skeiðið 150 kr.

**Kom og Dansa**

Visti tú ikki tað? Sosialurin